## United-leikari fer til heimlandið

Alt bendir á, at Mikael Silvestre fer heim til Fraklands at leika fótbólt framyvir. Tað er Bordeaux, ið gjarna vil hava fatur á sterka verjuleikaranum. Tað er fyrrverandi viðleikarin hjá Silvestre í United, Laurent Blanc, ið er venjari hjá Bordeaux, og vil seta franska landsliðsleikarin á liðið. Silvestre hevur verið nógv skaddur farna kappingarár, men megnaði ikki at vinna sær plássið á liðnum, tá ið hann gjørdist klárur aftur.



## Ronaldo svarar aftur

Cristiano Ronaldo er als ikki nøgdur við ákærurnar, sum hann fær frá fólki. Tey vilja vera við, at hann bara gera snillingar fyri at stuttleikar. Nú svarar Ronaldo fólkunum aftur í enska blaðnum Daily Mirror. – Soleiðis gjørdi eg, tá ið eg var lítil og spældi fótbólt á gøtuni. Eg helt fram at gera tað til venjing, og geri tað enn tann tað í dag. Og tað fari eg eisini at halda fram við, sigur Cristiano Ronaldo við Daily Mirror.

# Kaotisk súkklukapping

**Alt bendir á, at føroyska súkklulandsliðið súkklaði seg til silvur í landavegskoyring. Men mikumorgunin vóru úrslitini framvegis ikki tøk**



*Tá kappingin loksins kom ígongd, gekk bara heilt væl. Ikki minst hjá føroyingum, sum tykjast hava koyrt seg til silvur í liðkappingini*

*Mynd: Høgni R. Øster*

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá landavegssúkklingin var av týsdagin, høvdu Føroyar fleiri súkklarar við í heilt góða endanum. Bogi Kristiansen kom fimtur á mál. Gunnar Dahl-Olsen varð nummar sjey og Torkil Veyhe kom á mál á 15 plássi.

Enn eru almennu úrslitini ikki komin út, men so vítt føroyingar sjálvir hava talt saman, so verður talan um silvurmerkið til liðið. Og tað má metast sum eitt kanón-úrslit.

### Kaos

Men undan hesum hevði reint kaos valdað í kappingini. Á neutrala startinum, har feltið fyrst rullar 4,2 kilomitrar, áðrenn kappingin veruliga byrjar, stungu tríggir súkklarar av, uttan at hetta fekk nakrar avleiðingar.

Hartil var eingin leiðbeining, fyrstu ferð súkklararnir skuldu velja millum tveir møguligar vegir, og tá varð úrslitið, at helmingurin av feltinum koyrdi skeivt.

Tá fyriskipararnir komu eftir hesum, gjørdist neyðugt við umstartið. Hetta í sjálvum sær var sjálvandi ógvuliga frustrerandi hjá mongu súkklarunum, men frustratiónin bleiv til øði lítla løtu seinni.

Dómararnir í kappingini hildu nevnliga fast um leiðsluna á 2,40 minuttir, sum tjóvstarturin hevði givið trimum súkklarum. Fleiri av londunum ætlaðu sær at rýma, tá hetta kom fram, men millum annað við góðum semingsarbeiði frá Gunnari Dahl Olsen eydnaðist tó at fáa nýggju kappingina startaða.

Og so gekk tað mesta so kortini, sum tað skuldi. Tjóvstartarnir vórðu allir koyrdir aftur, so teir ikki endaðu í heiðursmerkjarøðini. Ikki óvæntað komu fremstu súkklararnir av Saaremaa, Man og Bermuda, men altso við føroyingum á fleiri av næstu plássunum.

Enn er tó ikki greitt, um hetta gav heiðursmerki. Frá fyriskiparunum vóru boðini, at nú starturin hevði tikið somikið drúgva tíð, vóru ikki stundir at handa heiðursmerkini. Og mikumorgunin – hálvt samdøgur eftir kappingarlok – vóru framvegis eingi úrslit tøk.

## Eli datt

Eli Christiansen fekk sær ein ordans sendara, tá landavegssúkklingin var á skránni. Í fyrstu atløgu hevði hann rent á ein lítlan stein, men tað tóktist ikki nerva nakað, og tí súkklaði hann víðari saman við restini.

Í næstu undanbrekkuni kom hann tó eftir, at framhjólið var punkterað, og tí ikki veruliga kundi stýra súkkluni. Men tá var ov seint, sum Eli sjálvur tók til.

- Eg visti tað nøkur sekund áðrenn fallið, at tað fór at enda galið. Og tey sekundini eru helst tey truplastu. Tað einasta, sum eg kundi gera, var at leita eftir eini bleytari lending, men hon var so ikki at finna, helt hann.

Føroyski súkklarin slapp tó toluliga væl frá óhappinum. Armurin varð kanska nakað illa skamfílaður, men talan var ikki um brot, og tí var nóg mikið at reinsa sárini og leggja bind á. Men sjálvur roknar Eli tó við, at hann ikki súkklar meira á leikunum, har tíðarkoyringin enn er eftir.

# Endaðu nummar 10




*Liðkappingin í borðtennis er nú av. Í dag verður farið undir kappingarnar í ein- og tvímansleiki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Við at kalla reinari U-manning taptu Føroyar fyri Saaremaa í dystinum um 9. plássið í liðkappingini**

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyar og Saaremaa hittust eisini í fyrsta dystinum í liðkappingini, og tá vunnu Føroyar ein tryggan sigur.

Hesa ferð var spælt um, hvat lið skuldi gerast nummar 9 ella 10, og tann dystin vunnu estlendingarnir 5-2.

Tað skal tó leggjast afturat, at venjarin undan dystinum hevði valt at rotera nakað við fólkunum, og tí var sterkasta føroyska kortið, Kjartan Eli Hentze, bert við í blandaðum tvímansleiki. Og úr einum føroyskum sjónarhonri hevði tað helst størstan týdning, at tað kortini eydnaðist helst yngsta liðnum í kappingini at vinna tveir dystir. Og so sjálvandi royndirnar, sum spælararnir annars fingu. Og so kundi tað bara staðfestast, at tað var heilt nær við, at ungu spælararnir eisini megnaðu at basa Saaremaa.

Føroysku sigrunum syrgdu Rói Agnarsson og Susie Midjord fyri í hvør sínum einmansleiki.

Rói var eisini nær við at vinna seinna einmansleikin, men mátti tó lúta 3-2. Hallur Thorsteinsson tapti sín dyst móti Saaremaabúgvanum 3-1, og báðar tvímansleikirnar taptu okkara fólk við 3-2. Susie Midjord og Shaila Strøm vóru enntá tá á odda 2-1 í settum, men tær máttu lúta við 12-10 í seinasta og avgerandi settinum.